## DAGSINS MEINING

# Alternativar orkukeldur

Flestøll munnu síggja interkommunala elfelagið SEV sum ein afturlatnan stovn og sum ein stovn, ið ikki hevur sýnt hug og vilja til at skifta orð um orkupolitikkin í Føroyum. Vit minnast, hvussu stívrend leiðslan í SEV var, tá alt rokið var um, hvussu vatnorkan skuldi útbyggjast. SEV avvísti hvørja roynd at umrøða aðrar møguleikar, enn teir, sum leiðslan í fyritøkuni hevði læst seg fasta í. Hetta var mikið spell, tí aðrir og meira náttúruvinarligar møguleikar vóru í vatnorkuni, enn tær loysnir, ið SEV-leiðslan við síni rágeving hevði valt.

Hesin atburðurin hjá SEV-leiðsluni var eyðkendur fyri eina monopolfyritøku. Afturlatni, konservatisma, betrivitska og trótandi vilja til broytingar eru klassisk eyðkenni fyri monopolfyritøkur. Men SEV-leiðslan ber ikki einsamøll ábyrgdina fyri tí fyri føroysku náttúruna so harðrendu útbygging av vatnorkuni eitt nú í Eysturoy. Politikkarar úr øllum flokkum hjálptu væl til og úrslitið gjørdist hareftir.

Men nú tykist ein broyting at hómast í monopolstøðuni hjá hesi almáttugu kommunalu fyritøku. Hóast SEV hevur fingið einarætt til alla vatnorku í Føroyum, so hevur fyritøkan ikki einarætt til alternativar orkukeldur so sum vindmegi og streymmegi. Við vindmyllunum hjá s/pf Røkt í Vestmanna er monopolstøðan hjá SEV av álvara farin at rilla. Orkumálaráðharrin, Eyðun Eltør, segði nøkur sera áhugaverd orð á hátíðarhaldinum í sambandi við, at tær tríggjar vindmyllurnar uppí á Mýrunum vórðu settar í gongd. Hann segði, at nú má netið hjá SEV latast upp fyri grønum orkukeldum. Hetta kann bert merkja, at aðrir veitarar eins og Røkt eiga at sleppa at bjóða seg fram við alternativum loysnum og eiga hesir at sleppa inn á netið hjá SEV.

Nevnt varð í hesum sambandi, at netið hjá SEV hevði avmarkað rúmtak fyri streymi frá vindorku, og at pláss fór bert at verða fyri streymi frá vindmyllum, sum SEV fer at seta upp í Eysturoy. Hetta er ein spurningur um tøkni, og má kunna loysast. At SEV fer undir at seta 3 vindmyllur upp afturat er í sjálvum sær ein kollvelting og sera áhugavert. Tað vísir, at sjálvt í SEV blæsa broytingarvindar. Tað verður spennandi at síggja, hvat hetta kann føra til, sum frá líður.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Åbent brev til Statsminister Anders Fogh Rasmussen



**Marjus Dam,**
*Lagtingsmand, Sambandspartiet Færøerne*

**Hr Statsminister, velkommen til Vagar flyveplads**

Det tog sin tid at lande på flyvepladsen i Vagar. En forklaring er, at en kraftigt tiltrængt udbygning af flyvepladsen endnu ikke er lavet.

Jeg skriver også disse få linier, for at lede opmærksomheden på det faktum, at en af Statens opgaver på Færøerne er selve flyvepladsen. Selv om daværende lagmand E. Joensen i 1997 bad om at flyvepladsen blev udbygget, må man konstatere, at al snak om udbygning til 1800 meter af flyvepladsen stoppede, da forholdene Færøerne/Danmark blev totalt forpestede ved koalationsdannelsen efter valget i 1998.

Når staten har flyvepladsen som sit ansvarsområde, burde staten vedkende sig dette ansvar, og udbygge flyvepladsen til 1800 meter. Desuden ville dette sende nogle meget klare og positive signaler, der kun ville styrke Rigsfællesskabet. At staten vil gardere sin investering på flyvepladsen ville de fleste nok regne med.

Et er dog klart: Løsrivelses fadæsen (der klart har et flertal af færinger imod sig) må ikke stoppe udbygningen af flyvepladsen mere.

Jeg håber inderligt, at statsministeren vil arbejde positivt for, at flyvepladsen bliver udbygget til 1800 meter - snarest.

En tilfældig koalationsdannelse må ikke længere forhindre en nødvendig udbygning og modernisering at flyvepladsen og Rigsfællesskabet. Den må ikki få lov til at skade rigsfællesskabet.

Der har altid været tradition for, at Færøernes minister er Statsministeren. Jeg vil ønske, at relationerne imellem disse to dele af riget styrkes og forbedres, til fælles gavn.

Der kan synes at være en vanskelig opgave, særlig i disse tider, hvor det færøske folk er hårdt presset af nogle elementer, der som deres opgave ønsker skade forholdene i riget mest muligt.

Statsministeren skal vide en ting. Disse folk ønsker kun en ting. Nemlig at statens opgaver på Færøerne bliver misligeholdt mest muligt. Det kan de bruge som argument for at Rigsfællesskabet ikke fungerer: Et eksempel på et område hvor rigsfællesskabet ikke fungerer er flyvepladsen på Vágar.

Her har staten klart ikke gjort hvad den er forpligtiget til. Nemlig at udbygge flyvepladsen til 1800 meter.

Jeg håber at statsministeren og regeringen vedkender sig sit ansvar på dette område!

# Nýrafelagið almennan fund

Í sambandi við »Ár teirra brekaðu 2003« hevur Nýrafelagið tikið stig til at fáa fólk frá danska Nyreforeningen til Føroya at greiða frá um ymisk evni sum viðkoma nýrasjúklingum.

Fundurin verður leygardagin 6. september kl. 18.00 í Veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum, har øll eru vælkomin.

Formaðurin í danska Nyreforeningen, Stig Hedegaard Kristensen, næstformaðurin Lone Kiilerich og Ole Lings, konsulentur hjá Nyreforeningen fara at røða um evnini: Hvat krevur ein dialysusjúklingur anno 2003, Lógin um heiladeyðskriteriið og transplantatión, Kostur til nýra-/dialysusjúklingar og um Avvarðandi/foreldur til nýrasjúkling.

Fríggjadagin 5. september fara tey at hava fund fyri starvsfólk innan sjúkrahúsverkið.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Útlitini hjá ísfiskatrolarunum eru døpur

**- Fer upsaprísurin ikki upp aftur, vænti eg, tað fer at tátta í hjá trolarunum, sigur Oskar Joensen á Fiskamarknaði Føroya**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Landing á Toftum týsmorgunin. Hetta er fiskur hjá trolaranum, Smaragd, sum P/F Snodd landaði.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Týsmorgunin kom línuskipið, Morgunstjørnan, undan Íslandi við 150.000 pundum av toski, hýsu, brosmu og longu. Fiskurin varð lagdur uppá Toftum, og uppboðssølan seldi lastina fyri ein miðalprís sum var 9,60 fyri kilo.

Oskar Joensen, sum starvast á Fiskamarknaðinum, sigur, at miðalprísurin hjá línuskipunum undan Íslandi hevur ligið báðumegin 10 kr. fyri kilo í seinastuni.

– Ein fittur partur av veiðini hjá Morgunstjørnuni var brosma, og hon hevur ikki so góðan prís. Hevði meira verið av toski, hevði miðalprísurin eisini verið nakað hægri.

### Stille og roligt

Oskar væntar ikki, at henda vikan verður so rokaslig á Fiskamarknaðinum, tí streymurin hevur verið harður og línuskipini, sum royna undir Føroyum, eru nýliga farin útaftur. Haraftrat kemur, at trolbátarnir, sum hava roynt á landleiðini, nú eru givnir, tí loyvið gekk út, 1. september. Nakrir landaðu í síðstu viku og gjørdu síðan ein stuttan túr aftrat.

Meginparturin av veiðini hjá trolbátunum á landleiðini hevur verið flatfiskur – og eisini hann hevur fingið ein lægri prís í summar.

– Eg havi skilt, at fiskiskapurin hjá trolbátunum hevur verið á leið tann sami sum seinasta summar, tó kanska heldur slakari hjá onkrum báti, sigur Oskar.

Á Fiskamarknaði Føroya vænta tey, at onkur landing kanska verður aftur seinni í hesi vikuni.

### Keypa beinleiðis

Oskar sigur, at uppboðssølan selir næstan ongan upsa í løtuni. Upsin verður í stóran mun seldur beinleiðis til virkini.

Spurdur, hví so er, sigur hann, at upsin sum heild hevur sera lágan

prís, og skipini munnu væl halda, at tað loysir seg líka frægt at selja hann beinleiðis til virkini.

– Reiðaríini vænta ikki, at munurin við beinleiðis sølu og sølu um uppboðssøluna hevur nakran serligan týdning fyri prísin, tey fáa í løtuni.

Oskar ásannar, at virkini lata lítlan pris fyri upsan.

– Nógvur upsi er at fáa, og marknaðurin er ógvuliga vánaligur. Tí gera virkini næstan sum tey vilja, heldur hann.

Spurdur, um hann heldur, at prísgongdin við upsanum sum frá líður man fara at ganga útyvir ísfiskatrolararnar, sigur hann:

– Ja, kemur ikki vend í, er væntandi, at lágu prísirnir fara gera, at tað fer at tátta í hjá trolarunum, sigur hann.

### Onkuntíð lægri

Vit fegnaðust eisini, um fiskaprísirnir í Føroyum nakrantíð hava verið lægri enn í dag, síðan Fiskamarknaður Føroya sá dagsins ljós fyri meira enn 10 árum síðan.

– Prísirnir eru sum heild lágir í dag, men teir hava verið lægri. Minnist eg rætt, lógu línubátarnir á einum miðalprísi, sum var einar 7 kr. fyri kilo nakað eftir, at uppboðssølan byrjaði. Eg haldi eisini, at prísirnir onkuntíð vóru lægri enn tað. Í dag selja línubátarnir, sum nevnt, fyri ein miðalprís, sum liggur báðu megin 10 kr. fyri kilo, sigur Oskar Joensen.

# Eingin kryvjing á Bakkafrost í eitt heilt ár

**– Vit verða lidnir at taka laks á Skálafjørðinum í hesum mánaðinum og laksurin, sum nú gongur á Lambavík, verður ikki tøkuførur fyrr enn um eitt ár ella so, sigur Hans Jacobsen á Bakka**

LAKSAVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Á Bakkafrost á Glyvrum verða tey liðug at taka laks í hesum mánaðinum.*
*- Í løtuni keypa vit at kalla allan laksin, sum verður virkaður á virkinum. Hesin kemur kruvdur til virkingar, sigur Hans Jacobsen á Bakka.*

**Glyvrar:** Á Bakkafrost á Glyvrum, har eini 15 fólk støðugt hava kruvt laks í langa tíð, verður eingin kryvjing aftur fyrr enn um eitt ár ella so.

Hans Jacobsen sigur, at tá ið september mánaði fer at líða, verður eingin laksur eftir at taka á Skálafjørðinum.

– Sostatt verður neyvan nøkur kryvjing aftur á virkinum, fyrr enn laksurin, sum nú gongur á Lambavík, verður tøkuførur einaferð seint komandi ár, sigur hann.

Alingin hjá Bakkafrost hevur havt tað ógvuliga stríggið í hesum árinum, tí laksurin hevur verið fongdur við herviligu ILA-sjúkuni, sum hevur gjørt um seg um meginpartin av landinum.

### Keypa aðrastaðni

Men hóast Bakkafrost ongan tøkuføran fisk hevur, heldur góðskingarvirksemið á virkinum fram.

– Vit keypa laks til virkingar frá øðrum virkjum kring landið, men hesin fiskurin verður kruvdur, har hann verður tikin. Flestu alarar hava eisini kryvjivirki, og tí kemur laksurin, sum vit keypa, kruvdur til virkingar.

Hans sigur, at Bakkafrost í løtuni keypir at kalla allan laksin, sum nú verður virkaður á Glyvrum, frá øðrum alarum.

– Hóast vit ongan tøkuføran laks hava, tá ið hesin mánaðin fer at líða, heldur virksemið á Bakkafrost fram. Vit hava sáttmálar við keyparar, sum røkka heilt út í apríl mánaða, sigur hann.

### Minni doyr av ILA

Hans Jacobsen veit annars at siga, at í løtuni doyr at kalla eingin laksur av ILA-sjúkuni kring landið, hóast alibrúk framvegis eru fongd við sjúkuni.

– Tað vísir seg, at ringast er við fellinum, tá ið broytingar fara fram í sjónum. Hetta geldir bæði, tá ið sjógvurin verður kaldari, og tá ið hann verður heitari. Í slíkum førum ger sjúkan mest um seg.

Hann heldur, at hesar broytingar taka nógv uppá fiskin, sum frammanundan er sjúkur.

– Tað visir seg, at sjúki fiskurin verður lættari strongdur, sigur Hans.

### Smoltstøðin í Dalinum

Uppi á Dal, sunnanfyri Lambabygd, hevur felagið smoltstøð, sum letur smolt til virksemið hjá felagnum.

– Vit hava nakað av smolti á Lambavík, og tað er hesin fiskurin, sum verður tøkuførur um eitt gott ár ella so, sigur Hans Jacobsen á Bakka.